# Samskipari

## av barnaansingarøkinum

**Frá ár 2000 yvirtekur kommunan alla umsitingina av barnaansingini. Í tí sambandi verður eitt nýtt starv sum samskipari/ráðgevi innan ansingarøkið hervið lýst leyst.**

**Arbeiðið**

**Arbeiðsøkini eru m.a.:**
- Dagstovnarnir
- Dagrøktin
- Frítíðarskúlarnir

**Arbeiðsuppgávurnar eru m.a. at:**
- syrgja fyri at politiski og pedagogiski málsetningurin hjá býráðnum verður fylgdur
- vera bindilið millum stovnarnar og umsitingina
- vera ráðgevi hjá stovnsleiðarum
- samskipa virksemi hjá stovnunum

**Førleikakrøv**

Námsfrøðiliga ella líknandi útbúgving. Umsitingarligar royndir og kunnleiki til edv er ein fyrimunur.

**Setunarviðurskiftir**

Treytað av Landstýrissins góðkenning verður starvið sett skjótast til ber.

**Meir fæst at vita**

við at venda sær til Jákup Simonsen, deildarleiðara, ella Gunnleyg Durhuus, trivnaðarstjóra, telefon 315160.

**Umsókn**

saman við viðmælum og upplýsingum um útbúgving og royndir skulu vera Tórshavnar kommunu, Postboks 32, 110 Tórshavn í hendi í seinasta lagi 20. januar 2000. Merk umsóknina "Samskipari".

Í kommununi eru umframt Dagrøktina 10 kommunalir og 10 sjálvsognarstovnar við pláss fyri tilsamans 1360 børnum. Í ár 2000 verður bygt út millum Gilja og á Ternuryggi, har 20 barnagarðspláss fleiri verða á hvørjum stovni. Eisini verður nýggjur stovnur bygdur í Vesturbýnum við pláss fyri 60 barnagarðsbørnum.

# Psykologur

**Til sosialu deild, sum er ein partur av trivnaðarfyrisitingini hjá Tórshavnar kommunu, verður søkt eftir psykologi.**

**Arbeiðið**

Psykologurin skal virka sum ráðgevi og supervisor í barnaverndarmálum og í ávísan mun hava viðtalur við viðskiftafólk. Harumframt skal hann virka sum ráðgevi og supervisor hjá málsviðgerðunum og hjá leiðsluni í almennum spurningum innan fakøkið, herundir viðvíkjandi samskipan og samstarv við aðrar myndugleikar og stovnar.

Vit vænta, at viðkomandi kann arbeiða sjálvstøðugt og vera við í ráðlegging og samskipan av uppgávunum.

**Førleikakrøv**

Umsøkjarin skal vera útbúgvin sum psykologur. Autorisatión og royndir frá líknandi starvi er ein fyrimunur.

**Setunarviðurskifti**

Treytað av Landstýrissins góðkenning verður starvið sett skjótast til ber. Løn sambært sáttmálanum millum Fíggjarmálastýrið og Magistarafelag Føroya.

**Meira fæst at vita**

við at venda sær til Eyðun Jensen, sosialdeildarleiðara ella Gunnleyg Durhuus, trivnaðarstjóra, telefon 315160.

**Umsókn**

saman við viðmælum og upplýsingum um útbúgving og royndir skulu vera Tórshavnar kommunu, Postboks 32, 110 Tórshavn í hendi í seinasta lagi 20. februar 2000. Merk umsóknina "Psykologur".

Tórshavnar kommuna



# Dansifrøi



## Ársveitsla

**Ársveitslan verður í Hoydølum leygarkvøldið 22. januar 2000.**
Borðhaldið byrjar kl. 19.30. Orkestur spælir til dans.

Atgongumerki, sum kosta 250 kr., fáast til keyps í Mótaskálanum í Dr. Jakobsensgøtu ella hjá nevndarlimunum.

Avgjørt seinasta freist at keypa atgongumerki er **mikudagin 19. januar.**

**Ársaðalfundur**
**Mint verður eisini á ársaðalfund felagsins, sum verður sunnudagin 30. januar 2000, kl. 15.00, á Hotel Hafnia.**

**Við dansikvøðu NEVNDIN**

# Avloysari til skrivstovustarv

S&K-felagið søkir eftir avloysara fyri skrivstovufólk, ið skal í barnsburðarfarloyvi.

Arbeiðið umfatar í høvuðsheitum at upplýsa limum felagsins um fakfelagsviðurskifti t.v.s. sáttmálan og viðkomandi lógir so sum lógina um starvsmenn, frítíðar- og lærlingalógina.

Tann, ið settur verður, kemur at byrja um 1. februar 2000 og er arbeiðstíðin frá 9.00-12.00.

Løn sambært S&K-sáttmálanum.

**S&K-felagið**

# Lærlingur

Søkt verður eftir lærlingi til plátu- og málaraverkstað okkara, at byrja sum skjótast. Er áhugi fyri handverkaraútbúgving við góðum framtíðarmøguleikum, so send okkum eina skrivliga umsókn.

Partur av frálæruni er á donskum skúla, tískil krevst lokið 10. floks prógv ella samsvarandi prógv.

Merk brævbjálvan: Plátusmiðjur

**P/F WENZEL - FORD**
Postsmoga 3043
110 Tórshavn
Tlf. 313873

# Fráboðan um umhvørvis-góðkenning

Við hesum verður gjørt kunnugt, at Heilsufrøðiliga Starvsstovan tann 14. desember 1999, við heimild í grein 26 í løgtingslóg nr. 134 frá 29. oktober 1988 um umhvørvisvernd og kunngerð nr. 54, grein 1, stk. 4, hevur góðkent:

**Jarnmóttøku hjá IRF, Gjánoyri**

Góðkenningin liggur alment frammi á Heilsufrøðiligu Starvsstovuni. Avgerðin kann kærast til Føroya Landsstýri. Møgulig kæra skal sendast Heilsufrøðiligu Starvsstovuni, Debesartrøð, FO-100 Tórshavn, í seinasta lagi 4 vikur frá dags dato.

**Heilsufrøðiliga Starvsstovan**

# Fráboðan um umhvørvis-góðkenning

Við hesum verður gjørt kunnugt, at Heilsufrøðiliga Starvsstovan tann 16. desember 1999, við heimild í grein 26 í løgtingslóg nr. 134 frá 29. oktober 1988 um umhvørvisvernd og kunngerð nr. 54, grein 1, stk. 4, hevur góðkent:

**Jarnmóttøku hjá KOB, Sandvíkarhjalli**

Góðkenningin liggur alment frammi á Heilsufrøðiligu Starvsstovuni. Avgerðin kann kærast til Føroya Landsstýri. Møgulig kæra skal sendast Heilsufrøðiligu Starvsstovuni, Debesartrøð, FO-100 Tórshavn, í seinasta lagi 4 vikur frá dags dato.

**Heilsufrøðiliga Starvsstovan**

**Føroya Handilsskúli**

# DATANOMSKEIÐ

Um nóg stórur áhugi er, verður í heyst farið undir 2 nýggj datanomskeið, hesaferð í

**Systemmenning II** (lærari Poul Rytter Larsen)
**Dátugrunnar II** (lærari Allan Dresling)

Tey, sum vilja vita meira um skeiðini, kunnu venda sær til skúlan eftir tilfari ella hyggja á heimasíðuna:
**heima.olivant.fo/~jonsen/datanom**

**Próvtøkan verður hálvan mai**.

Roknað verður við, at skeiðluttakararnir hava merkonomútbúgving ella hægri handilsprógv ella drúgvar, fjølbroyttar royndir í arbeiði við teldum.

**Kostnaður kr. 2.150,00**, bókin ikki íroknað.

Áhugað verða biðin um at venda sær til skúlan tel. 31 71 77 skjótast gjørligt og **áðrenn mikudagin 26. januar.**

FØROYA HANDILSSKÚLI
Marknagilsvegur 77 • Postsmoga 177 • FO-110 Tórshavn

Sosialurin - 311820

www.sosialurin.fo



# KEYP SUMMAR-DEKKINI NÚ



**4 stk. alufelgur 7x15" 4x100**
**4 dekk 195.50x15**
**Prísur 5.900.-**
**Kunnu nýtast til t.d. Toyota, Opel, VW og aðrar.**

ES
P/f Esmar Simonsen
*Kambsdalur*
*Tel. 44 44 05 • Fax 44 46 29*
*E-mail: es@es.fo*

Sosialurin - 311820

## Til reiðar at gevast við roykingini?

## Er stundin komin til tín?

Eftir sjey viðtalur sleppir tú av við tubakkið!

**Dagar:**
24. og 31. jan.,
07., 09., 14. og 21. feb.
og 06. mars.
Kl. 18.00 (1-1 1/2 tíma)

**Kostnaður:**
Kr. 500,00 + MVG
(íroknað tilfar).

**Vegleiðari:**
Lynn Reveal, M. A.

**Stað:**
Dungagøta 6, Tórshavn

**Tilmelding:**
Ring tel. 319581
ella 316655

Sosialurin - 311820

**Bókhald Roknskapur Skattur**



Tosið við okkum um hóskandi loysn til júst tygara tørv

**Sandoyar Bókhaldsvirki**
FO 210 Sandur - Tlf. 361376 - fax 361309
e-mail: sand-bok@post.olivant.fo

# Advokatfelagið

Yviri við Strond 4 • Boks 359 • FO-110 Tórshavn
Tlf. 311260 • Fax 311261
Telefontíð: $9^{30}$ – $12^{00}$ og $13^{00}$ – $16^{00}$

| | |
|---|---|
| Tórmóður Djurhuus, adv. | Dánjal Magnussen,adv. |
| Jógvan Páll Lassen, adv. | Petur Even Djurhuus, adv. |
| Jógvan E. Ellefsen, adv. | Anna Dam, adv. |

Ingi Højgaard, adv.

# Aðalfundur í Gøtu lestrar- og umrøðufelag

Við hesum innkallar nevndin til aðalfund í Gøtu lestrar- og umrøðufelag hetta at verða **tann 6. februar ár 2000, kl. 16.00** í hølunum hjá Gøtu Fornminnisfelag.

Fundarskrá:
1. Val av orðstýrara.
2. Broyting av § 14 í viðtøkum felagsins, soleiðis at 2. punktum verður soljóðandi: »Syndrast felagið, skal, tá allar neyðturvuligar útløgur eru goldnar, avlop í bókum og ognum annars, verða givið til Gøtu Fornminnisfelag«.
3. Støðutakan til innkomið broytingaruppskot.
4. Avtøka av felagnum.

**Nevndin**




# Lærari til Viðareiðis skúla

Søkt verður eftir lærara til skúlan á Viðareiði at byrja sum skjótast. Starvið er at undirvísa fulla tíð fram til summarfrítíðina og lønt smb. avtalu millum Føroya Lærarafelag og Fíggjarmálastýrið frá lønarflokki 13.4 til 26.4.

Freistin at søkja er úti týsdagin 25. januar á miðdegi.

Skrivlig umsókn við prógvum og møguligum viðmælum verður at senda til

**Viðareiðis Skúlanevnd**
v/ Elsu Petersen
750 Viðareiði

# Adventistaskúlin

Børn, sum skulu í 1. fl. í Adventistaskúlanum eftir summarfrítíðina, verða innskrivað mánadagin 24. jan. frá kl. 16-18. Flokslærarin verður hjástaddur. Havið dóps- ella navnaseðil við.

**Adventistaskúlin tlf. 313260**

# DANNY TRANSPORT

- tá okkurt skal koyrast ella goymast

Tlf. 319192

# Starvsfólk til JT-Electric P/F

JT ELECTRIC Ltd.

*Føroyska vinnulívið er í støðugari menning. Framgongd er á nógvum økjum og av somu orsøk hevur P/F JT-Electric meira enn vanligt at gera. Vit hava brúk fyri góðum fólki at hjálpa okkum at tæna kundum okkara enn betur, tí søkja vit eftir fólki til hesi størv:*

## Sølu/goymslumaður

***Uppgávur***:
- Hava ábyrgd av goymsluni
- Seta goymslustýring í verk
- Hava ábyrgd av at vørur til projekt eru tøkar til tíðina
- Víðka um sambandið við verandi veitarar og viðskiftafólk
- Finna nýggjar veitarar og vørur
- Marknaðarføra vørur og tænastur

***Førleikakrøv***:
- Hava eina handilsliga útbúgving.
- Kunna arbeiða við fleiri tingum samstundis
- Hava hug at handla
- Verða nærlagdur
- Kunna tosa og skriva enskt á handilsstøði, kunnleiki til onnur mál er ein fyrimunur
- Hava góð samstarvsevni og vera fyrikomandi.

Løn eftir kvalifikatiónum

## Stýringar og instrumentering

P/F JT-Electric hevur brúk fyri einum dugnaligum verkfrøðingi til projektering við stórari processtekniskari vitan innan hesi øki:

***Uppgávur:***
- Processtekniskt lay–out
- Projektering og eftirlit
- Teknisk dokumentation
- PLC – stýringar
- SRO-anlegg

***Førleikakrøv:***
- El-verkfrøðingur, sterkstreymsteknikari, el-installatørur, elektronikkmekanikari ella líknandi tekniska útbúgving
- Holla tekniska bakgrund
- Royndir í at projektera processautomatión
- Nærlagdur við at dokumentera projektir og konstruktiónir
- Kunna tosa og skriva enskt rímiligt
- Hava góð samstarvsevni og vera fyrikomandi

Løn eftir kvalifikatiónum

## Lærlingar

P/F JT-Electric setur vanliga nakrar elektrikaralærlingar gjøgnum árið.
Gjøgnum lærutíðina geva vit lærlingum okkara eina so breiða fakliga vitan og so stórar avbjóðingar sum møguligt innan el-fakið.

***Førleikakrøv:***
- Hava eitt gott fólkaskúla prógv
- Verða áhugaður í el-tøkni
- Verða arbeiðsamur og nærlægdur
- Hava góð samstarvsevni og vera fyrikomandi.

## Upplýsingar um størvini

Um tú vilt vita meira um størvini er tú vælkomin at seta teg í samband við Virkisráðgeving Sp/f og tosa við **Símun Hammer, tlf. 44 95 91.**

## Skrivligar umsóknir

Áhugað verða biðin um at senda skrivliga umsókn í seinasta lagi 28. januar 2000. Umsóknirnar skulu merkjast ávikavist:
"jt-goymsla"
"jt-stýringar"
"jt-lærlingur" og skulu sendast til:

**Virkisráðgeving Sp/f**
**Postboks 26**
**600 Saltangará**

***P/F JT-Electric*** *er eitt el-virki við bústaði í Fuglafirði, virkið hevur 25 ár á baki. Arbeiðsøkið hjá virkinum í dag er at veita vørur og tænastur til tann føroyska ídnaðin. Virkið framleiðir m.a. undirvatnsljós, ið verða nýtt av alarum í Føroyum og uttanlands.*